# 1 Privatpolitikkur á IRF Kundaportalinum og appini

Tá tú stovnar tær ein brúkara til IRF Kundaportalin og IRF appina, góðtekur tú, at hesi viðgera ávísar persónsupplýsingar um teg.

Tað er sjálvboðið at nýta Kundaportalin og appina.

Bílegging av atgongd til Kundaportalin og appina kann fara fram umvegis telefon 414243 ella við at senda teldupost til irf@irf.fo.

Endamálið við Kundaportalinum og appini er, at tú kanst bíleggja tænastur frá IRF og hava yvirlit yvir, hvørjar tænastur tú hevur bílagt, umframt eisini at síggja hagtøl yvir avgreiddar bíleggingar.

## 1.1 Viðgerð av persónsupplýsingum:

IRF er dátuábyrgdari fyri tær upplýsingar, sum verða viðgjørdar í appini. Appin er partvíst ment av einum triðja parti, sum ikki hevur atgongd til upplýsingarnar. Appin viðger persónsupplýsingar, t.d. bústað og kontaktupplýsingar í sambandi við bílegging av tænastum.

## 1.2 Endamálið við viðgerðini av persónsupplýsingunum

Viðgerðin kann deilast í trý:

1. Tøming av bingjum (skráseting og goymsla av bústaði, telefonnummari, telduposti)
2. Heintan av burturkasti og endurnýtslutilfari (bústaður, telefonnummar)
3. Tøming av rottanga (bústaður, telefonnummar)

Viðgerðin er neyðug fyri at kunna halda avtaluna við viðskiftafólkið/brúkaran og at kunna veita hesar tænastur.

## 1.3 Goymsla

Persónsupplýsingarnar verða goymdar á tryggum servarum hjá veitara í Føroyum. Atgongdin til hesar upplýsingar eru avmarkaðar, og atgongdin til upplýsingar fáast bert í sambandi við eina ítøkiliga arbeiðsuppgávu.

## 1.4 Strikan av persónsupplýsingum

Persónsupplýsingarnar verða strikaðar, tá tað ikki longur er tørvur hjá IRF at hava tær, ella í seinasta lagi 5 ár eftir at avtalan millum partarnar er uppsøgd.

## 1.5 Tagnarskylda

Starvsfólk hjá IRF og hjá veitarum hjá IRF hava tagnarskyldu viðvíkjandi øllum viðurskiftum, sum viðvíkja viðskiftafólki hjá IRF.

## 1.6 Rættindini hjá tær sum brúkara

Sum brúkari hevur tú ávís rættindi í sambandi við viðgerð av tínum persónsupplýsingum. Tú kanst fáa innlit, kunning og annars gera tíni rættindi galdandi við at venda tær til IRF.

Upplýsingarnar, ið verða viðgjørdar um teg, sært tú í appini.

Varnast tú, at upplýsingar eru rangar, villleiðandi, ella at ov nógv verður skrásett um teg, kanst tú senda eina umbøn til IRF um at fáa rættað upplýsingarnar.

Upplýsingarnar verða ikki nýttar til marknaðarføring ella annað, sum ikki samsvarar við endamálinum við hesi appini.

### 1.7 Kæra til Dátueftirlitið

Ynskir tú at kæra ella átala viðgerðina av tínum persónsupplýsingum, kanst tú kæra til Dátueftirlitið:

**Dátueftirlitið**
Tinganes
Reyngøta 33
Postboks 300
FO-110 Tórshavn

## 2 Farspor

Fyri at skipanin skal virka, brúkar hon farspor. Ongar upplýsingar verða sendar til triðjapart og verða heldur ikki brúktar til reklamu og tílíkt.

## 3 Dátuverndarkunning í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum hjá IRF

IRF, sum er dátuábyrgdari, viðger persónsupplýsingar í sambandi við tær tænastur IRF bjóðar tær.

Í høvuðsheitum er talan um skráseting og goymslu av persónsupplýsingum til hesi endamál:

1. Heintan av húsarhaldsruski og endurnýtslutilfari (navn, bústaður og telefonnummar)
2. Tøming av bingju (navn, bústaður, telefonnummar og teldupostur)
3. Tøming av rottanga (navn, bústaður og telefonnummar)

Heimildin fyri viðgerðina av persónsupplýsingum, sum fer fram, stendur í dátuverndarlógini §8, stk.1 nr. 5 og nr. 2, og sigur, at viðgerðin er neyðug til tess at útinna uppgávur, sum eru álagdar okkum at gera ella fyri at kunna halda avtalu við teg í sambandi við aðrar tænastur frá okkum t.d. bílegging av bingju.

Í summum førum fáa vit ávísar upplýsingar frá kommununi t.d. í sambandi við broyting av bústaði ella tali av persónum í húsarhaldinum.

Víðarigevingin av upplýsingum frá kommunu til IRF hevur somu heimild, sum nevnt omanfyri.

### 3.1 Goymsla

Persónsupplýsingarnar verða goymdar á tryggum servarum hjá veitara í Føroyum. Atgongdin til hesar upplýsingar eru avmarkaðar, og atgongd fæst bert í sambandi við eina ítøkiliga arbeiðsuppgávu.

### 3.2 Strikan av persónsupplýsingum

Upplýsingarnar verða strikaðar, tá tað ikki longur er tørvur hjá IRF at hava tær, ella í seinasta lagi 5 ár eftir at avtalan millum partarnar er uppsøgd.

## 3.3 Tagnarskylda

Starvsfólk hjá IRF og hjá veitarum hjá IRF hava tagnarskyldu viðvíkjandi øllum viðurskiftum, sum viðvíkja viðskiftafólki hjá IRF.

Hevur tú spurningar til viðgerð av persónsupplýsingum, kanst tú venda tær til okkara Dátuverndarfólk á dpo@irf.fo

# 4 Tíni rættindi

## 4.1 Rætturin til innlit (§ 26)

Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg.

## 4.2 Rætturin til rætting (§ 27)

Tú hevur rætt til at fáa rangar upplýsingar um teg sjálvan rættaðar.

## 4.3 Rætturin til strikan (§ 28)

Í summum førum hevur tú rætt til at fáa upplýsingar um teg sjálvan strikaðar, áðrenn okkara ætlaðu strikan.

## 4.4 Rætturin til viðgerðaravmarking (§ 29)

Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit frameftir í útgangsstøðinum bert goyma persónsupplýsingarnar í ávísum føri.

## 4.5 Rætturin til dátuflutning (§ 31)

Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónsupplýsingar útflýggjaðar á einum skipaðum, vanligum nýttum og teldutøkum sniði, og at fáa hesar persónsupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing.

## 4.6 Rætturin til mótmæli (§ 32)

Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum.

## 4.7 Kæra til Dátueftirlitið

Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgdur við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum:

**Dátueftirlitið**

Tinganes

Postboks 300

FO-110 Tórshavn

dat@dat.fo

tel:309100